Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

SAMTYKT Á STÝRISFUNDI 17.03 2010

# FYRISKIPAN FYRI FYRISITINGARSTJÓRA

## Ábyrgd og myndugleiki

Fyrisitingarstjórin er ovasti leiðari fyri samlaðu umsitingini á Fróðskaparsetrinum innan fyri teir karmar, stýrið og rektarin seta.

Fyrisitingarstjórin er skrivari fyri stýrið og skal, í samráð við rektaran, fyrireika og geva tilmæli í teimum málum, sum verða løgd fyri tað.

Fyrisitingarstjórin er eisini, sjálvur ella um eitt av sínum starvsfólkum, skrivari hjá øðrum leiðslueindum á Setrinum.

Fyrisitingarstjórin hevur ábyrgdina av, at fíggjarumsitingin er í samsvari við almennu reglurnar á deildini um fíggjarumsiting og fyritreytirnar fyri tillutan av játtanini.

Fyrisitingarstjórin hevur ábyrgdina av, at fyrisitingarligu og umsitingarligu uppgávurnar verða útintar á fulldyggan hátt og í samsvari við ásettar lógir, reglur og leiðreglur, og eisini innan teir fíggjarligu karmar, sum stýrið setir.

## Aðalstarvssetningur

Fyrisitingarstjórin skal arbeiða fyri, at atføri (strategi) og mál innan gransking og fakliga menningararbeiðið og innan útbúgvingar- og miðlanarvirksemið á Setrinum verða ment og sett í verk.

Fyrisitingarstjórin skal, innan fíggjarligu karmarnar, sum stýrið setir, syrgja fyri, at mannagongdir og starvshættir í umsitingini eru fulldygg og av bestu góðsku.

Fyrisitingarstjórin ger og leggur fyri stýrið fíggjaruppskot og ársroknskap og heldur rektaran kunnaðan so hvørt um roknskaparstøðuna í mun til fíggjarætlanina og um annað av týdningi fyri virksemi Setursins.

Fyrisitingarstjórin skal syrgja fyri, at øll málsviðgerð er á fullgóðum stigi.

Fyrisitingarstjórin skal syrgja fyri góðum samskifti og kunning millum tey ymsu stigini á stovninum.

Fyrisitingarstjórin skal syrgja fyri, at Setrið hevur starvsfólka- og lønarpolitisk atføri og virkisætlanir, sum stuðla upp undir mál Setursins.

Fyrisitingarstjórin skal syrgja fyri, at Setrið hevur skipanir, sum tryggja, at góðskan í gransking og fakligum menningararbeiði og innan útbúgvingar- og miðlanarvirksemi er á hægsta stigi, umframt at gera sítt til, at arbeiðs- og læruumhvørvið er fullgott út frá eini meting við atliti at heilsu, umhvørvi, trygd og vælferð.

Fyrisitingarstjórin hevur í neyðugan mun og eftir áheitan frágreiðingarskyldu mótvegis setursstýrinum. Bæði fakliga og umsitingarliga/fyrisitingarliga virksemið kemur undir hesa skyldu.

Fyrisitingarstjórin skal birta undir, at samskifti við hægri myndugleikar, onnur universitet og aðrar samstarvsfelagar, í landinum og altjóða, verður hildið og ment.

Fyrisitingarstjórin skal stuðla til eitt hóskandi arbeiðsbýti við rektaran innan fyri karmarnar á galdandi fyriskipan.